# Aldubáran á rundferð

**Føroyski tónleikabólkurin Aldubáran fer í komandi viku á eina rundferð, har bólkurin fer at hava konsertir bæði í Danmark og Noreg**

TÓNLEIKUR

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*

Rundferðin hjá Aldubáruni byrjar í veruleikanum við eini lítlari venjingarlegu í Danmark í vikuskiftinum, áðrenn leiðin fyrst í komandi viku gongur til Noregs, har bólkurin týskvøldið skal hava eina konsert í Lyseblu í Oslo.



*Hendan myndin er frá konsertini, sum Aldubáran og Hanus G. Johansen høvdu saman í ár 2000. Júst tónleikur frá hesi konsertini fer at fylla ein stóran part av programminum í sambandi við rundferðini hjá bólkinum í næstu viku.*

*savnsmynd*

**Ein samansjóðing av tveimum konsertum**

Tveir dagar eftir konsertina í Oslo, fer bólkurin aftur á pall, og hesaferð verður tað í Karavanen í Århus. Tann seinasta av teimum trimum konsertunum, ið bólkurin fer at hava á konsertferðini hjá sær, verður á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn fríggjakvøldið 28. oktober. Felags fyri allar tríggjar konsertirnar er, at tær byrja klokkan 20.

Tónleikurin, ið Aldubáran fer at framføra á konsertferðini, verður ein samansjóðing av tveimum ymiskum konsertum, sum bólkurin hevði í ávíkavist ár 2000 og fyrr í ár.

Í fyrru hálvu av konsertunum á rundferðini í komandi viku fer Aldubáran at spæla ta konsert, sum varð framførd í april mánað í ár. Tónleikin til ta konsertina hevur Páll Sólstein, ið hevur sítt dagliga yrki á Kongaliga Kapellinum í Danmark, skrivað.

Í seinnu hálvu av konsertini spælir Aldubáran tónleik frá konsertini, ið bólkurin hevði saman við Hanus G. Johansen í Norðurlandahúsinum fyri fimm árum síðani. Eisini verða tríggjar nýggjar útsetingar av løgum hjá Hanusi framførd á konsertini. Talan er um útsetingar til løg, ið Hanus hevur gjørt til yrkingar hjá Jacob Sande.

Aldubáran hevur fingið Andras Sólstein at greiða áhoyrarunum frá um teir yrkjarar og yrkingar, ið verða spældar á konsertini.

Á hesari rundferðini er ikki ætlanin at koma til Føroya at spæla, men Aldubáran sigur seg hava ætlanir um at koma hendanvegin í februar mánað komandi ár.

# Íslendski fiskimálaráðharrin takkar føroyingum

**Í hesum døgum er nýggi íslendski fiskimálaráðharrin, Einar K. Guðfinnsson, á vitjan í Føroyum, og á samkomu í Klaksvík týskvøldið sendi hann eina serliga tøkk til føroyingar**

VITJAN

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*



*Íslendski fiskimálaráðharrin, Einar K. Guðfinnsson, í miðjuni avmyndaður saman við eitt nú Bjørn Kalsø, landsstýrismanni, Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóra.*

*Mynd: www.klaksvik.fo*

Einar K. Guðfinnsson er á vitjan hjá Bjørn Kalsø, landsstýrismanni í fiskivinnumálum, og týsdagin vitjaðu teir báðir í Klaksvík. Á samkomu í Skálanum týskvøldið helt íslendski fiskimálaráðharrin røðu, og hann nýtti høvi til at takka føroyingum fyri hjálpina, sum teir veittu íslendingum í sambandi við vanlukkurnar í Suðavík og á Flateyri í 1995.

**Er sjálvur úr økinum**

Á heimasíðuni hjá Klaksvíkar Kommunu stendur at lesa, at íslendski fiskimálaráðharrin, sum sjálvur er úr økinum við Suðavík og Flateyri, í røðu síni greiddi frá, at tann stóra tøkk, sum føroyingar tá veittu bygdarfólki og næstringum hansara í bygdunum báðum, var høvuðsorsøkin til, at fyrsta vitjan hansara uttanlands sum fiskimálaráðharri er júst í Føroyum.

– Hetta var so fløvandi í neyðini og hjartaligt, at allir íslendingar eru føroyingum sera takksamir fyri hjálpina, sum teir minnast við takksemi og virðing, segði Einar K. Guðfinnsson millum annað.

## Skjótt koyrandi eftir Tórsgøtu aftur

Tað hevur merkt ferðsluna í miðbýnum nokk so fitt, at Tórsgøta hevur verið stongd fyri gjøgnumkoyring í sambandi við, at arbeitt hevur verið upp á vegamótið Tórsgøta/Sverrisgøta.

Arbeiðið skuldi verið liðugt í farnu viku, men vánalig veðurlíkindi hava gjørt sítt til, at arbeiðið er seinkað í nakrar dagar, men í dag skuldi arbeiðið verið liðugt, og væntandi verður latið upp aftur fyri gjøgnumkoyring fríggjadagin.

**tn**

# Anna skal leiða barnaverndarstovuna

Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag hava í felag sett Onnu Dam, løgfrøðing, í starv sum leiðari á Barnaverndarstovu Føroya.

Anna Dam verður ikki einsamøll á skrivstovuni, sum letur upp í KSF-húsunum í R. C. Effersøesgøtu 30 tann 1. desember. Umfamt leiðaran verður Hallbjørg Lamhauge, sosialráðgevi og familjuviðgerði, sett í starv at leiða fosturforeldraskipanina og at ráðgeva barnaverndartænastunum í sosialfakligum spurningum.

Hóast skrivstovan ikki letur upp fyrr enn um ein góðan mánað, fer Barnaverndarstovan beinan vegin undir fyrireikandi virksemi.

Barnaverndarstovan skal eitt nú arbeiða fyri at styrkja og samskipa lokalu barnaverndartænasurnar kring landið, umframt vegleiða og ráðgeva hesar. Eisini skal Barnaverndarstovan skipa fyri undirvísing og førleikamenning, umframt skipa og umsita eina fosturforeldraskipan fyri at alt landið.

**tn**



*Tey bæði starvsfólkini á Barnaverndarstovu Føroya, uttast til vinstru Hallbjørg Lamhauge og síðani Anna Dam saman við Rósu Samuelsen, forkvinnu í Føroya Kommunufelag, og Rodmundi Nielsen, formanni í Kommunusamskipan Føroya*